

## Gott eg skrivaði undir áðrenn hendan dystin

Landsliðsmiðverjin hjá Víkingi, Atli Gregersen, spældi fríggjakvøldið sín seinasta dyst fyri Víking á hesum sinni. Hann pakkar nemmiliga kufferti og fer av landinum mikudagin, har eitt sum Ross County leikari bíðar. – Eg eri glaður fyri at eg havi skriva undir við Ross County áðrenn hendan dystin, tí eg hevði ikki blivi seldur uppá avrikið í dag. Tað er ein tóm kensla eg standi eftir við, eg havi brúkt nógvar tímar í Sarpugerði og tað eri eg glaður fyri og hvør veit, kanska verið eg at síggja aftur her eina ferð, men dysturin í dag ikki mátin eg ætlaði at siga farvæl við Víking, sigur Atli Gregersen. Atli var alt annað enn nøgdur við avrikið hjá Víking í dystinum í móti B68. – Hetta er ein katastrofa. Eg veit ikki hvat hetta var fyri nakað. Tað var sum at hyggja eftir 5.deild. Vit vilja einki og teir vilja einki og vit raka ikki hvønn annan og teir raka ikki hvønn annan. Ongin vinnur nærdystirnar og alt fer bra upp í at rópa eitt sindur eftir Eiler og tað er tað. Eg klári ikki ein gongd at hissa meg upp til at gera ein takling, her er einki skil í, sigur Atli Gregersen. Víkingur megnaði ongantíð at trýst B68 ímóti endanum av dystinum. - Vit trúgva ikki uppá tað tá vit koma út aftur til seinna hálvleik. Tað er líka Kaj Leo í Bartalstovu, ið hevur nakrar góðar dribblingar, men annars hava vit ikki tríggjar samanhangandi avleveringar í dystinum, sigur Atli Gregersen at enda.

*trondur@sosialurin.fo*

# Feðgar deildu í Sarpugerði

**VODAFONEDEILDIN** Teir búgva í sama húsið og eru nærmasta familja, men í 90 minuttir var ongin familju kærleiki millum feðgarnir báðar Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, og André Olsen, miðvallari hjá B68. Tað endaði við at teir deildu stigini millum sín í einum málleysum javnleiki

Tróndur Arge

| | |
|---|---|
| Víkingur | 0 |
| B68 | 0 |

Sum venjari hjá Víkingi skuldi Jógvan Martin Olsen fríggjakvøldið fortelja sínum leikararum hvussu teir skulu steðga B68 miðvøllinum. Har í millum manninum við 23-talinum hjá B68, ein ávísur André Olsen. Í B68 skiftirúminum sat ein B68 miðvallari og setti seg upp til, at vinna á Víkingi og venjarinum hjá teimum, ein ávísur Jógavn Martin Olsen. Tað sermerkta við støðuni er bara, at teir eru pápi og sonur og umboða hvør sítt lið. Men hvussu er tað at verða venjari tá sonurin er á mótstøðu liðnum?

– Tað er sjálvandi ein serstøk støða, me vit hava vant okkum við tað, so tað er ikki nakar trupulleiki. André er ein mótstøðuleikari hjá okkum í dag og harfrá taka vit tað. Vit taka í hondina á hvørjum øðrum tá vit fara frá húsum og tað er tað. Hetta er sum so ikki eitt fokus umráði hjá okkum. Vit hava klára tað væl higartil, sigur Jógvan Martin Olsen.

Hóast tað ljóðar sum eitt stuttlig søga, so kann tað eisini gerast eitt sindur heitt á vøllinum, tá tvey eysturoyarlið bresta saman.

– Um ein dystur stendur at koppa annan vegin, so kann tað blíva heitt og tá kann tað gerast óbehagiligt um vit ikki klára at stýra okkum, sigur Jógavn Martin Olsen.

André Olsen hevur verið ein av berandi kreftinum á B68 liðnum í ár. Hann er tann spælarin, ið hevur spælt sjeynd mest minuttir fyri toftamenn í ár.

– Tað er serstakt tí vit búgva saman, men eg hugsi ikki so nógv um tað. Tað er ein vanligur dystur fyri meg. Tað kennist heldur ikki undarligt at pápi mín leggur taktik ímóti B68 og mær, tað gera allir aðrir venjarar eisini, so tað er púra vanligt, sigur André Olsen.

Dysturin var sum heild illa spældur og tað illa hjá liðnum at fáa spælið at hanga saman. Hóast tað, so komu bæði liðini til fleiri málmøguleikar í fyrra hálvleiki.

– Fyrri hálvleikur var undirhaldandi við fleiri málmøguleikum til báðar partar. Vit hava fleiri ungar leikarar á liðnum og eykennandi fyri ungar leikarar er, at teir kunnu spæla væl í nakrar dystir, men klára ikki at halda støðið í longri tíð, sigur Jógvan Martin Olsen

– Vit byrja dystin væl, men missa síðani takið á dystinum í einar tjúgu minuttir, men seinasta korteri av fyrra hálvleiki eru vit omaná aftur, sigur sonurin, André Olsen.

Seinni hálvleikur var long oyðumarkingargongd við fleiri feilavleveringum og lítið áskoðaravinarligum fótbólti.

– Seinni hálvleiki var eitt stórt rót allur sum hann var. Samanspælið riggaði illa hjá báðum liðnum og tað bleiv fyri tað mesta til langar bóltar, sigur Jógvan Martin Olsen.

Í seinna hálvleik eru vit eit sindur betri, men tað er einki spæl. Vit fáa mótvind og tað ávirkar spælið, men vit hava heldur ikki fingið stig á útivølli, so tað var eisini umráðandi at fáa stig burtur úr dystinum og tað gjørdu vit so. Vit trúðu uppá sigurin, men eitt stig í Gøtu er ongin katastrofa, sigur André Olsen at enda.

Niðurstøðan av dystinum er at hvørkin parturin vildi tapa eftir ringu gongdina seinastu tíðina og tí endaði dysturin í einum málleysum javnleiki. Eftir dystin tóku Jógavn Martin Olsen og André Olsen í hondina í hvørjum øðrum og kundu aftur fella í rolluna sum pápi og sonur – tað er inntil næstu ferð at Víkingur og B68 bresta saman.




**FEÐGAR**

*Feðgarnir báðir André Olsen hjá B68 og Víkinga venjarin Jógvan MArtin Olsen, takað í hondina eftir dystin og semjast um stigini.*



*Geza Turi hevði her eina avgerðandi meistarabjarging*

Myndir: Álvur Haraldsen